# Veðrið

## Fimm-daga-for-søgnin frá DMI



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin snarar han í landsynning og eitt skifti regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Um kvøldið upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.



*Umframt vøkru tekningarnar hevur Palli Gregoriussen eisini sett húsanøvnini undir myndirnar. Á hesari myndini eru tey frá vinstu: Sjóvinnubankin, Nólsoyarstova, Klokkarastova, Nýggjastova, Katrina Christiansen, Fútastova, Vetshúsinið, Hotel Hafnia, Essaba og Niels Arge*

# Havnin umskapað í 20. øld

*Við meistarligu tekningum sínum vísir Palli Gregoriussen okkum, hvussu Havnin sær út í dag - og tann, ið vil vita meira um húsa- og staðarnøvn í Havn hevur stóra fragd av bókini, »Tórshavn vár miðstøð og borg II«*

Eirikur Lindenskov

– Ivi man eigin vera um, at tær stóru og ørkymlandi broytingarnar, ið fóru fram tey seinastu áratíggjuni av 20. øld, hava umskapað og broytt Havnina og umhvørvið á heilt avgerandi hátt. Fólk, ið kanska hava verið útisetar eitt stutt tíðarskeið, hava ilt við at fóta sær og kenna seg aftur, meðan vit, ið liva her dagliga, ikki kenna hetta á sama hátt. Vit varnast tað ivaleyst, men ilt er hjá okkum at taka dagar ímillum. Vit kunnu bert ásanna, at so er.

Soleiðis greiðir Palli Gregoriussen frá um bókina, »Tórshavn, vár mistøð og borg«, sum nú er at fáa í bókabúðunum.

Palli er arkitektur og hevur teknað nógvar mætar bygningar, men seinastu árini hevur hann víst síni evni á listarliga økinum, eitt nú við stórverkinum um kirkjurnar.

Í 1989 kom út fyrra bókin við tekningum úr Havnini. Hon var tá skrýdd við umleið 90 svørt/hvítum tekningum. Leingi hevur Palli ætlað at bókin skuldi koma útaftur - tó í meira bókakendum líki við litløgdum tekningum, sum í nýggja verkinum eru um 80 í tali.

Palli sigur, at hugsanin upprunaliga var at lýsa, hvussu statt er í Havnini, nú vit fara inn í 21. øld. Tíðarskeiðið, tekningarnar fevna um, er 1994-2000. Til ber at siga, at bókin lýsir Havnina hetta seksára skeiðið.

Bókin er skipað í fimm pørtum: Tinganes og gamla Havnin, havnarlagið, miðbýurin, uttan um miðbýin og uttan um Havnina.

Eitt áhugavert við bókini er, at nøvn á húsunum eru undir øllum myndunum. Tann, ið hevur áhuga fyri húsum og býlingum í Havnini finnur stóra fragd í hesi bók, sum í so máta eisini kann brúkast sum uppslagsbók um hús í Havn - eitt gott ískoyti til søguna um Havnina.

Fremst í bókini eru frágreiðingar til ymsu partanar í bókini. Greitt verður m. a. frá um Tinganes og gomlu Havnina, um havnarlagið, vágirnar báðar og fergumenninar, Dia við Stein, Tomm og Nikláa. Greitt verður frá um, hvussu miðbýurin tók at vaksa eftir at kongiligi einahandilin var tikin av í 1856. Sagt verður eisini frá traðarmonnunum og um, hvussu teir ognarleysu við lógini frá 1863 fingu høvi at keypa træðirnar, teir sjálvir høvdu lagt inn - og um risastóra Stóragarð, ið røkkur úr Válgaravík á Penapláss kring Havnina og út í Sandágerð.

Bókin, sum er innbundin í stíva permu, kostar 280 krónur.




Lágtrýstið yvir Íslandi grynnist, men lagtrýstið vestanfyri Biscaya fer móti Írlandi og dýpist.




Lágtrýstið við Írland fer í landnyrðing norðan og verður yvir Føroyum leygardagin.




**Hitalagið mált frá 17./10. kl 06⁰⁰–18./10. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°C**
Minsti hiti máldur í oktober: **÷4,0°** Mesti hiti máldur í oktober: **18,4°**




Avfallið: 6,0 mm – **mált frá 17./10. kl 6⁰⁰–18./10. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í oktober: 80,8 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 12 |
| Keypmannahavn | 10 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 22 |
| Athen | – |
| Malta | 21 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |


**TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG**



**12. MAÐUR**
**http://soccer.at/faroes**


## Vestfalskyrrindi

19. okt.: Mánin næstur jørðini
20. okt.: Seinna kvarter
27. okt.: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. okt. | – | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 11.33 | – | 01.42 | 14.18 | 02.42 | 15.18 | 10.33 | 23.13 | 09.33 | 22.13 | – | 12.33 | 00.57 | 13.33 | – | 12.03 | 00.42 | 13.18 |
| 21. okt. | 00.58 | 13.45 | – | 12.45 | 00.13 | 13.00 | 02.58 | 15.45 | 03.58 | 16.45 | – | 12.00 | 11.00 | 23.48 | 01.13 | 14.00 | 02.13 | 15.00 | 00.43 | 13.30 | 01.58 | 14.45 |
| 22. okt. | 02.33 | 15.19 | 01.33 | 14.19 | 01.48 | 14.34 | 04.33 | 17.19 | 05.33 | 18.19 | 00.48 | 13.34 | – | 12.34 | 02.48 | 15.34 | 03.48 | 16.34 | 02.18 | 15.04 | 03.33 | 16.19 |
| 23. okt. | 04.01 | 16.35 | 03.01 | 15.35 | 03.16 | 15.50 | 06.01 | 18.35 | 07.01 | 19.35 | 02.16 | 14.50 | 01.16 | 13.50 | 04.16 | 16.50 | 05.16 | 17.50 | 03.46 | 16.20 | 05.01 | 17.35 |

Kelda: Skipalistin 2000